1. juli 2015
Mál: Click here to enter text.
Viðgjørt: Heini Petersen og Heri Petersen

**Uppskot**

**Til**

**Løgtingslóg um familjuískoyti**

**§ 1.** Familjuískoyti verður veitt til húski við skrásettum bústaði í Føroyum við heimabúgvandi barni undir 18 ár.
*Stk.2.* Fyri húski, ið hava eitt inntøkugrundarlag, ið er 120.000 kr. ella lægri, er familjuískoyti ásett til 20.000 kr. um árið.
*Stk.3.* Fyri húski, ið hava eitt inntøkugrundarlag, ið er hægri enn 120.000 kr., verður familjuískoyti ásett við at taka 17,5% av muninum millum inntøkugrundarlagið og 120.000 og draga hetta tal frá 20.000.
*Stk.4.* Inntøkugrundarlagið er inntøkan nevnd í § 2 lækkað við eini upphædd, ið svarar til tað vanliga barnagjaldið eftir løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. fyri hvørt heimabúgvandi barn undir 18 ár.
*Stk.5* Um tað í húskinum er meira enn ein persónur, ið er 18 ár ella eldri, verður inntøkugrundarlagið sambært stk. 4 lækkað við eini upphædd, ið svarar til tvær ferðir vanliga barnagjaldið eftir løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.
*Stk.6.* Familjuískoyti dettur burtur, um útgjaldið er 100 kr. ella minni.

**§ 2.** Inntøka er:
1) Skattskyldug inntøka sambært skattalógini
2) Inntøka, ið er heilt ella partvís skattafrí sambært skattalógini, t.d. DIS inntøka
3) Lestrarstuðul, ið verður roknað sum studningur lagt saman við einari upphædd, ið svarar til hægstu árligu lestrarlánsupphædd til livikostnað sambært løgtingslóg um lestrarstuðul.
4) Nettovinningur, ið er skattskyldugur sambært kapitalvinningsskattalógini
5) Leiguinntøka
6) Skattafrádráttur sambært § 3 í løgtingslóg um áseting av skatti

*Stk. 2.* Inntøkutíðarskeiðið, sum avger um familjuískoyti verður grundað á, er inntøkan seinast farna skattaár (inntøkuár) ásett av líkningarmyndugleikanum. Um inntøkan broytist munandi í mun til farna skattaár, kann avgerð um familjuískoyti grundast á eina metta ársinntøku, útroknaða við støði í inntøkuni í løtuni og mett frameftir.
*Stk. 3.* Sum skjalprógv fyri inntøkur sambært stk. 1, verða nýttar eitt nú uppgjørdar sjálvuppgávur og endauppgerðir frá TAKS, kontoavrit frá fyribilssskattaskránni hjá TAKS, váttan frá Studna ella útlendskum stuðulsveitara um lestrarstuðul.
*Stk. 4.* Tá inntøkugrundarlagið verður uppgjørt, skulu skattafríar inntøkur sambært stk. 1, nr. 2 og 3 upproknast soleiðis, at tær samsvara við skattskylduga inntøku, og síðani leggjast afturat skattskyldugu inntøkuni
*Stk. 5.* Er skattskylduga inntøkan 65.000 kr. ella hægri, verður funnið fram til inntøkugrundarlagið við at leggja afturat skattskyldugu inntøkuni eina upphædd samsvarandi við skattafríu inntøkuna faldað við 1,83.
*Stk. 6.* Er skattskylduga inntøkan lægri enn 65.000 kr., verður fyrst funnið fram til samlaða nettoinntøkugrundarlagið, og síðani verður inntøkugrundarlagið funnið við at upprokna samlaða nettoinntøkugrundarlagið til skattskylduga inntøku. Samlaða

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

nettoinntøkugrundarlagið verður roknað soleiðis:
1) Er skattskylduga inntøkan hægri enn 30.000 kr., men lægri enn 65.000 kr., er samlaða nettoinntøkugrundarlagið nettoinntøkan umframt 75% av skattskyldugu inntøkuni umframt 6.300 kr.
2) Er skattskylduga inntøkan 30.000 kr. ella lægri, er samlaða nettoinntøkugrundarlagið nettoinntøkan umframt 96% av skattskyldugu inntøkuni.

*Stk. 7.* Samlaða nettoinntøkugrundarlagið sambært stk. 6 verður upproknað til skattskylduga inntøku soleiðis:
1) Er nettoinntøkugrundarlagið 28.750 kr. ella lægri, verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,04.
2) Er nettoinntøkugrundarlagið hægri enn 28.750 kr., men lægri enn 54.900 kr., verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,34, og síðani verður 8.500 kr. drigið frá.
3) Er nettoinntøkugrundarlagið 54.900 kr. ella hægri, verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,83, og síðani verður 35.400 kr. drigið frá.

**§ 3.** Húski sambært § 1 fevnir um umsøkjaran, hjúnarfelaga hansara, heimabúgvandi børn og onnur, ið búføst eru í bústaðnum sambært Landsfólkayvirlitinum.

**§ 4.** Familjuískoyti verður útgoldið tí, ið uppiheldur barninum, og sum hevur foreldramyndugleikan yvir einum barni, hevur lut í foreldramyndugleikanum ella hevur góðkenning sum fosturforeldur og sambært Landsfólkayvirlitinum hevur barnið búgvandi.

*Stk. 2.* Umsókn um familjuískoyti verður latin inn til Almannaverkið. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um ískoyti.

*Stk. 3.* Almannverkið kann heinta inn upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um familjuískoyti frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi, ið hava kunnleika til viðurskiftini.

*Stk. 4.* Familjuískoyti verður útgoldið hvønn ársfjórðing og fyrstu ferð, rætturin til familjuískoyti er staðfestur.

*Stk. 5.* Umrokning, eftirrokning, afturgjaldskrav og upplýsingarskylda eru sambært ásetingunum í løgtingslóg um almannapensjónir.

**§ 5.** Familjuískoyti kann ikki verða veitt, um húski eigur ogn, ið er mett til eina upphædd, ið er omanfyri 30.000 kr.

*Stk. 2.* At meta sum ogn er innistandandi í peningastovni, virðisbrøv og kapitalpensjón, ið er tøk um umsóknarmundið.

*Stk.3* Undantikið er ogn, ið er neyðug at varðveita við atliti at bústaðarviðurskiftum hjá húskinum.

**§ 6.** Almannaverkið heitir eina ferð um árið á tey, ið fáa familjuískoyti sambært hesi lóg, um skrivliga at vátta, at tey framhaldandi lúka treytirnar fyri at fáa familjuískoyti.

*Stk. 2.* Hevur Almannaverkið ikki móttikið váttanina seinast ein mánað eftir áheitan, steðgar útgjaldið av familjuískoytinum frá næsta ársfjórðingi. Útgjaldið kemur aftur í gildi ársfjórðingin eftir, at váttanin er móttikin.

**§ 7.** Rætturin til familjuískoyti kann ikki verða fyri rættarsókn, fyrr enn hann er útgoldin. Avtala um transport er útgjaldaranum óviðkomandi.

**§ 8**. Umsøkjarin hevur skyldu til at boða Almannaverkinum frá varandi broytingum í inntøkuviðurskiftunum og øðrum viðurskiftum, ið skerja rættin til familjuískoyti.

**§ 9.** Almannaverkið hevur fyrisitingina av familjuískoytinum um hendi.

*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

**§ 10.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Høvuðsamboðið í stríðnum móti fátækradømi er við útbúgvingar- og arbeiðsmarknaðarpolitikki at stuðla undir, at borgarar í Føroyum finna sítt pláss á arbeiðsmarknaðinum. Harumframt er neyðugt við átøkum, sum eru við til at bróta negativan sosialan arv tíðliga í lívinum soleiðis, at fleiri børn fáa størri sannlíkindi fyri at fáa eitt sjálvstøðugt lív, har tey eru sjálvforsyrgjandi.

Hóast samfelagið hevur ein langskygdan vælferðarpolitik og ein rúmligan arbeiðsmarknað, so er neyðugt at hava skipanir at lofta teimum, ið detta niðurímillum. Tað vilja altíð vera borgarar, sum koma í sosialar støður, sum hava við sær, at tey kunnu hava trupult at uppihalda sær og sínum. Tí er, umframt langskygdan politikk, eisini neyðugt við skipanum, sum við stuttum skotbrái byrgja upp fyri, at fólk enda í fátækradømi. Serliga hevur tað týdning at byrgja upp fyri, at børn uppliva fátækradømi. Kanningar í øðrum londum vísa, at fátækradømi rakar børnini serliga hart, og eisini stutttíðar fátækradømi kann fáa avleiðingar seinni í lívinum.

Endamálið við hesi lógini er at bøta um fíggjarligu korini hjá barnafamiljum, ið hava lágar inntøkur, og hava trong fíggjarlig kor. Fátækradømi kann sum nevnt ikki burturbeinast einans við almannaveitingum, men hetta uppskotið skal bøta um ringastu avleiðingarnar av at hava lága inntøku. Familjur við lágum inntøkum kunnu sambært hesi lógini søkja um familjuískoyti, sum kann vera upp til 20.000 kr. árliga. Ískoytið lækkar stigvíst, so hvørt sum inntøkan hækkar. Endamálið er at veita teimum, sum hava trupult við at fáa gerandisdagin at hanga saman fíggjarliga, eina hjálpandi hond. T.v.s. tað eru allar inntøkur í einum húski, sum verða tiknar við, tá familjuískoytið skal ásetast, eins og umsøkjarar ikki skulu hava ognir av týdningi.

Tað hava serliga verið stakir uppihaldarar, sum hava verið tiknir fram sum ein bólkur, ið hevur trong fíggjarlig kor, og sostatt er tað eisini veittur ein serligur stuðul til stakar uppihaldarar. Men tað eru pør við børnum, sum í Føroyum hava eins trong fíggjarlig kor sum stakir uppihaldarar. Tí verður familjuískoytið ikki einans eyðmerkt til støk við børnum.

Tað eru tó fleiri støk við børnum, ið hava lágar inntøkur, enn tað eru pør, ið hava lágar inntøkur, og tí verða tað eisini nakað fleiri støk, ið fara at hava rætt til familjuískoytið. Av teimum húskjum, ið fara at móttaka familjuískoyti, verða umleið 2/3 stakir uppihaldarar, meðan 1/3 verða familjur við meira enn einum vaksnum persóni.

Familjuískoytið verður sum nevnt eyðmerkt húskjum við lágum inntøkum. Tað verða serliga lesandi, og støk, ið arbeiða niðursetta tíð, sum fara at fáa høgt ískoyti, men tað eru eisini aðrir samfelagsbólkar, ið hava lágar inntøkur, sum eisini fara at fáa familjuískoyti, tó at tað í

høvuðsheitum koma at vera lægri upphæddir. Í umleið triðinginum av øllum húskjum, ið fara at móttaka familjuískoyti, eru ein ella fleiri, ið eisini móttaka útbúgvingarstuðul.

*Verandi skipanir við barnastuðli*

Við teimum skipanum við barnastuðli, sum eru í gildi í dag, er stuðulin lutfalsjavnur við tal av børnum. Stuðulin er ein ávís upphædd fyri hvørt barni, og t.v.s. at tess fleiri børn tess hægri stuðul. Verandi skipanir við barnastuðli eru:

- *Barnafrádráttur í skattinum*, ið verður veittur til allar barnafamiljur. Barnafrádrátturin er í miðal 12.793 kr. um árið fyri hvørt barnið
- *Barnaískoyti* til stakar uppihaldarar er 10.000 kr. um árið fyri hvørt barnið
- *Barnagjald* er ein skipan, har tann av foreldrunum, sum ikki hevur barnið búgvandi hjá sær, rindar eitt gjald til hitt foreldrið. Vanliga barnagjaldið er 12.996 kr. um árið fyri hvørt barnið.

**Árligur barnastuðul í 2015**

| | **1 barn** | **2 børn** | **3 børn** | **4 børn** |
|---|---|---|---|---|
| Miðal barnafrádráttur | 12.793 | 25.586 | 38.379 | 51.172 |
| Barnaískoyti | 10.000 | 20.000 | 30.000 | 40.000 |
| Barnagjald | 12.996 | 25.992 | 38.988 | 51.984 |
| **Tilsamans** | **35.789** | **71.578** | **107.367** | **143.156** |

At hava fleiri børn, hevur við sær fleiri útreiðslur, men at hava tvey børn kostar ikki tað tvífalda í mun til at hava eitt barn, og at hava trý børn kostar ikki trýfalt o.s.fr. Sum nevnt eru verandi stuðulsskipanir lutfalsjavnar við talið av børnum, men familjuískoytið verður samansett øðrvísi.

*Familjuískoytið*

Familjuískoytið kann vera upp til 20.000 kr. um árið, óansæð talið av børnum. Tó verður veittur ein frádráttur í inntøkugrundarlagnum fyri hvørt barnið, og tað merkir, at familjur við fleiri børnum fáa eitt sindur meira enn familjur við fáum børnum – tó ongantíð meira enn 20.000 kr. tilsamans.

Í mun til støk við børnum fáa húski, har tað búgva meira enn ein vaksin, eisini ein frádrátt í inntøkugrundarlagnum. Hetta merkir, at samanbera vit eitt par við børnum og ein stakan uppihaldara við børnum, sum hava somu húskisinntøku, fær parið hægri familjuískoyti - hetta tí tey eru fleiri, ið skulu liva av somu inntøku.

Fult familjuískoyti verður veitt, tá inntøkugrundarlagið er 120.000 kr. ella lægri, og inntøkugrundarlagið, ið er hægri enn 120.000 kr. verður mótroknað við 17,5 prosentum.

Hetta merkir, at um inntøkugrundarlagið t.d. er 121.000 kr. lækkar familjuískoytið við 175 kr. um árið (svarandi til 17,5 prosent av 1.000 kr.).

Tað verður veitt ein frádráttur í inntøkugrundarlagnum, svarandi til barnagjaldið fyri hvørt barnið, ið er skrásett at búgva og faktiskt uppiheldur sær hjá húskinum, umframt ein frádráttur í inntøkugrundarlagnum á tvær ferðir barnagjaldið, um tað í húskinum er meira enn ein persónur, ið er 18 ár ella eldri. Barnagjaldið í 2015 er 12.996 kr.

Í praksis merkir hetta, at t.d. ein stakur uppihaldari við einum barni, ið hevur eina árliga lønarinntøku á 150.000 kr., hevur eitt inntøkugrundarlag á 150.000 kr. frároknað eitt barnagjald (150.000 kr. minus 12.996 kr.), svarandi til 137.004 kr. Hevur sami persónur tvey børn, er inntøkugrundarlagið 150.000 kr. minus 2x12.996, svarandi til 124.008 kr.

Eitt par við tveimum børnum verður inntøkugrundarlagið samlaða inntøkan hjá báðum frároknað 4 ferðir barnagjald (eitt barnagjald fyri hvørt barni umframt tvey barnagjøld, tí í húskinum er meira enn ein vaksin).

**Lækking av familjuískoyti**




Myndin omanfyri vísir, hvussu familjuískoytið lækkar í mun til árliga inntøku.

Niðanfyri eru nøkur dømi um familjuískoyti til ymsar inntøkubólkar.

**Árligt familjuískoyti til støk**

| | 1 barn | 2 børn | 3 børn |
|---|---|---|---|
| Árlig inntøka 140.000 kr. | 18.774 | 20.000 | 20.000 |
| Árlig inntøka 180.000 kr. | 11.774 | 14.049 | 16.323 |
| Árlig inntøka 220.000 kr. | 4.774 | 7.049 | 9.323 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Árlig inntøka 250.000 kr. | 0 | 1.799 | 4.073 |

**Árligt familjuískoyti til pør**

| | 1 barn | 2 børn | 3 børn |
|---|---|---|---|
| Árlig inntøka 140.000 kr. | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| Árlig inntøka 180.000 kr. | 16.323 | 18.597 | 20.000 |
| Árlig inntøka 220.000 kr. | 9.323 | 11.597 | 13.872 |
| Árlig inntøka 250.000 kr. | 4.073 | 6.347 | 8.622 |

Endamálið við familjuískoytinum er at hjálpa teimum húskjum, sum ikki fáa gerandisdagin at hanga saman fíggjarliga, og tí hava tey, sum hava ognir av týdningi, ikki rætt til familjuískoyti. Ásett er, at familjuískoyti kann ikki verða veitt, um eitt húski eigur innistandandi í peningastovni, virðisbrøv ella kapitalpensjón, ið er tøk um umsóknarmundi, ið hevur eitt virði á 30.000 kr.

Niðanfyri eru lýst nøkur dømi um, hvussu familjuískoytið ávirkar inntøkuviðurskifti hjá nøkrum útvaldum familjutýpum.

*Lesandi - stakur uppihaldari við tveimum børnum, uttan aðra inntøku enn ÚS*:

Inntøka uttan familjuískoyti: ÚS íroknað barnastuðul frá Studna er 80.069 kr. um árið. Aftrat hesum skal leggjast barnafrádráttur í skattinum, barnaískoyti til stakar uppihaldarar og barnagjald, svarandi til 71.578 kr. Hetta gevur eina samlaða inntøku eftir skatt á 151.647 kr. um árið, svarandi til 12.637 kr. um mánaðin.

Inntøka íroknað familjuískoyti: Hóast ÚS-veitingin verður umroknað til brutto, og ein upphædd svarandi til lestralán er løgd aftrat inntøkugrundarlagnum, er inntøkugrundarlagið lægri enn markið á 120.000 kr., og viðkomandi fær sostatt fult familjuískoyti svarandi til 20.000 kr. um árið. Samlaða inntøkan hjá hesum verður sostatt 171.647 kr., svarandi til 14.304 kr. um mánaðin eftir skatt (upphædd svarandi til lestralán skal leggjast aftrat inntøkugrundarlagnum, hóast viðkomandi ikki brúkar møguleikan – lestralán er í hesum døminum ikki við í endaligu inntøkuni).

*Par við tveimum børnum – bæði lesandi, uttan aðra inntøku enn ÚS*:

Inntøka uttan familjuískoyti: ÚS íroknað barnastuðul frá Studna er 63.217 kr. í part. Aftrat hesum skal leggjast barnafrádráttur í skattinum á 25.586 kr. Hetta gevur parinum eina samlaða ársinntøku eftir skatt á 152.020 kr., svarandi til 6.334 kr. um mánaðin í part.

Inntøka íroknað familjuískoyti: Tá ÚS-veitingin á 63.217 kr. verður umroknað til brutto, og ein upphædd svarandi til ÚS-lán hjá báðum er løgd aftrat, er inntøkugrundarlagið umleið 214.000, og hetta gevur eitt familjuískoyti á 12.650 kr. um árið. Samlaða árliga inntøkan eftir skatt hjá hesum verður sostatt 164.670 kr. svarandi til 6.861 kr. um mánaðin í part (upphædd

svarandi til lestralán skal leggjast aftrat inntøkugrundaralagnum, hóast viðkomandi ikki brúkar møguleikan – lestralán er í hesum døminum ikki við í endaligu inntøkuni).

*Stakur uppihaldari við tveimum børnum, sum móttekur forsorgarhjálp*:

Inntøka uttan familjuískoyti: Forsorgarveitingin er 180.228 kr. um árið. Aftrat hesum skal leggjast barnafrádráttur í skattinum, barnaískoyti til stakar uppihaldarar og barnagjald, svarandi til 71.578 kr. Hetta gevur eina samlaða árliga inntøku eftir skatt á 189.700 kr., svarandi til umleið 15.800 kr. um mánaðin.

Inntøka íroknað familjuískoyti: Inntøkan á 180.228 kr. gevur rætt til eitt familjuískoyti á umleið 14.000 kr. um árið. T.v.s. árliga inntøkan hækkar til gott 194.000 kr. eftir skatt, svarandi til umleið 17.000 kr. um mánaðin.

*Stakur uppihaldari við tveimum børnum, ið arbeiðir fulla tíð við løn sbrt. sáttmála millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag (lægsti tímasatsur)*:

Inntøka uttan familjuískoyti: Árlig lønarinntøka er umleið 236.000 kr. Aftrat hesum skal leggjast barnafrádráttur í skattinum, barnaískoyti til stakar uppihaldarar og barnagjald, svarandi til 71.578 kr. Hetta gevur eina samlaða árliga inntøku eftir skatt á 216.600 kr., svarandi til umleið gott 18.000 kr. um mánaðin.

Inntøka íroknað familjuískoyti: Inntøkan á 236.000 kr. gevur rætt til eitt familjuískoyti á umleið 4.250 kr. um árið. T.v.s. árliga inntøkan hækkar til umleið 220.850 kr. eftir skatt, svarandi til umleið 18.400 kr. um mánaðin.

*Inntøkugrundarlag*

Við ásetan av familjuískoytinum verður øll vanlig inntøka tikin við. Inntøkur, ið ikki eru skattskyldugar, sum t.d. ÚS, verða umroknaðar til brutto, soleiðis at ÚS verður javnsett við vanliga skattskylduga inntøku. Tó verður barnagjald og barnaískoyti til stakar uppihaldarar ikki tikið við sum inntøka.

Útgangsstøðið er inntøka farna skattaár, men atlit kann eisini takast til væntaða inntøku frameftir. Er sannlíkt, at inntøkuviðurskiftini frameftir broytast skal Almannaverkið, sum er umsitingarmyndugleiki, kunnast, og familjuískoyti kann tillagast hareftir. T.d. tey, ið flyta frá útbúgving til arbeiðsmarknað, koma í eina nýggja fíggjarliga støðu, og familjuískoyti skal tí ásetast av nýggjum. Ov nógv útgoldið familjuískoytið verður kravt inn umvegis TAKS.

Tað er inntøka hjá øllum, sum búgva í húskinum, sum verður tikin við í inntøkugrundarlagið. T.v.s. at í húskjum við t.d. fleiri ættarliðum skal inntøkan hjá øllum takast við. Hjá einum

støkum uppihaldara, ið býr hjá sínum foreldrum, skal inntøkan hjá foreldrunum eisini takast við. Tað sama er galdandi, um talan er um eina familju, ið hevur heimabúgvandi vaksin børn. Inntøkan hjá vaksnu børnunum skal teljast við í inntøkugrundarlagið. Men ein barnafamilja, sum býr í kjallarum hjá foreldrum, men í egnari íbúð við egnari adressu, skal einans inntøkan hjá barnafamiljuni takast við.

At familjuískoytið er sett saman á henda hátt, kann í ávísum førum hava við sær, at stakir uppihaldarar fáa hægri familjuískoyti, um tey hava børn, ið fylla 18 ár. Hetta er galdandi, um uppihaldarin eisini hevur yngri børn, ið er ein treyt fyri at móttaka familjuískoyti. Orsøkin er, at uppihaldarin verður roknaður sum sambúgvandi, um viðkomandi býr saman við einum persóni, ið er 18 ár ella eldri, og tað gevur rætt til ein eyka frádrátt í inntøkugrundarlagnum. Tað kann tykjast løgið, at familjuískoytið hækkar, tá barnið fyllir 18 ár, men havast skal í huga, at uppihaldarar í júst hesi støðuni kunnu koma í eina fíggjarliga trongstøðu, tí tá barnið fyllir 18 ár, og tá detta burtur ein røð av øðrum fyrimunum, og alt annað líka, vil samlaða inntøkan framhaldandi minka. Tá barnið fyllir 18 ár, dettur barnafrádrátturin burtur, eins og barnaískoyti og eitt møguligt barnagjald eisini dettur burtur. Um uppihaldarin fær forsorgarhjálp, verður viðkomandi samstundis roknaður sum sambúgvandi við hartil hoyrandi lægri veiting.

Hjá teimum, sum eru undir útbúgving, verður ÚS-lán tikið við í inntøkugrundaralagið, óansæð um møguleikin við láni verður brúktur ella ikki brúktur. Borgarin hevur fyrst og fremst skyldu at klára seg sjálvan og hevur skyldu at troyta allar møguleikar, og fyri lesandi verður mett, at lán er ein møguleiki at fáa gerandisdagin at hanga saman. Hjá lesandi, ið ikki hava aðra inntøku enn ÚS, er inntøkan nakað lægri enn inntøkumarkið á 120.000 kr., og tí hevur tað, at ÚS-lán verður tikið við í inntøkugrundarlagið, avmarkaðan týdning. Fyri støk lesandi, ið hava inntøku umframt ÚS, kann familjuískoytið lækka við upp til 4.600 kr. um árið, og er t.d. talan um eitt par, har bæði eru lesandi kann familjuískoyti lækkað við upp til 9.200 kr. um árið. Hetta er tó treytað av inntøku, familjustøðu og tal av børnum.

*Fleiri skipanir við mótrokning*

Tað er ikki hóskandi, at somu borgarar hava fleiri skipanir, har mótroknað verður í inntøku, tí tað er skjótt at koma í eina støðu, at tað, ið verður mótroknað, hevur hægri virði enn ein møgulig økt lønarinntøka. M.a. hevur skipanin við fíggjarligum fríplássum á dagstovnum havt hendan trupulleika. Mótrokning hevur sama virkna sum ein øktur marginalskattur. Tey, sum verða fevnd av skipanini við familjuískoyti, koma ikki í sama trupulleika, tí mótrokningin í familjuískoytinum er 17,5 prosent, sum kann leggjast aftrat skatti og arbeiðsmarknaðargjøldum á uml. 45,5 prosent. Men er tað eitt politiskt ynski at arbeiða víðari við t.d. eini skipan við bústaðarískoyti, har bústaðarískoyti m.a. er tengt at inntøku, kann familjuískoytið ikki varðveitast óbroytt.

**Ummæli:**

Hetta uppskotið hevur verið sent til ummælis hjá:

- Fíggjarmálaráðnum
- TAKS
- Almannaverkinum
- Sosialráðgevarafelag Føroya
- Kommunufelagnum
- Føroya Kærustovni
- Samtak
- Føroya Pedagogfelag
- S og K felagið
- Vinnuhúsinum
- Mentamálaráðnum
- Vinnumálaráðnum
- Studna

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum:**

**Fíggjarligar avleiðingar**

Tað er húskisinntøkan, sum er avgerandi fyri rættin til familjuískoyti. Hagstova Føroya framleiðir árlig hagtøl um húskisinntøkur, men tað eru ein røð av fyrivarnum í mun til at brúka hagtølini til at meta um fíggjarligar avleiðingar av hesum uppskotinum. Hagtølini, sum metingin byggir á, eru við støði í húskisinntøkum frá 2013, og t.v.s. familjumynstur og inntøkur kunnu vera broytt síðani tá. Harumframt skal fyrivarni takast fyri, at hagtølini eru grundað á inntøkur fult ár. Við hesi lógini kunnu tey, sum fáa eitt nýtt fíggjarligt grundarlag mitt í einum ári, fáa rætt til familjuískoyt/missa rætt til familjuískoyti. T.d. fólk, sum fara undir útbúgving ella gevast í útbúgving, ella pør, sum fara hvør til sítt o.s.fr.

Í hvønn mun nøkur fara at broyta atburð í mun til arbeiðsmarknaðin tí insitamentið at arbeiða lækkar, ber ikki til at meta um.

Sambært hagtølunum verða tað umleið 500-600 húskir, sum fara at fáa rætt til familjuískoyti, sum fara at fáa uml. 10.000 kr. árliga í miðal. T.v.s. kostnaðurin av hesum væntast at blíva uml. 5-6 mió. kr. árliga. Umleið 30-40 húskir væntast at fáa fult familjuískoyti – t.v.s. 20.000 kr. um árið. Umleið triðingurin av øllum húskjum hava í minsta lagi ein, sum eisini móttekur ÚS.

**Umsitingarligar avleiðingar**

Tað er Almannaverkið, sum fer at umsita skipanina við familjuískoyti. Almannaverkið skal taka ímóti og viðgera umsóknir og ráðgeva og vegleiða umsøkjarunum. Í mun til skipanina við t.d. ískoyti til stakar uppihaldarar, ið er einføld og gjøgnumskygd, er her talan um eina skipan, har neyðugt er við eftirliti við inntøkum og inntøkubroytingum hjá umsøkjarunum. Søkjast skal um familjuískoyti eina ferð um árið, men tá tað henda broytingar av týdningi í inntøkugrundarlagnum, skal familjuískoytið ásetast av nýggjum, og í nógvum førum verður neyðugt at gera rættingar afturvirkandi, og skuld skal møguliga staðfestast og sendast til innkrevjing.

Harumframt eru eisini umsøkjarar, ið hava B-inntøkur, sum krevur eina tyngri málsviðgerð.

Sambært hagtølum frá Hagstovuni væntast umleið 5-600 húskir at lúka treytirnar fyri familjuískoytinum. Tað eru vanliga eisini fleiri umsóknir, ið verða sýttar, og hesar krevja eisini viðgerð. Útreiðslurnar til umsiting metast at blíva umleið 3-4 ársverk, svarandi til 1,5 til 2 mió. kr. árliga.

Eisini er neyðugt at tillaga KT-skipanina, og men tað er í verandi støðu trupult at meta neyvt um kostnaðin av hesum. Almannaverkið metir leysliga, at útreiðslurnar verða uml. 150-200.000 kr.

Familjuískoytið verður útgoldið hvønn ársfjórðing.

**Avleiðingar fyri vinnuna**

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**Umhvørvisligar avleiðingar**

Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Sosialar avleiðingar**

Familjuískoytið er ein beinleiðis fíggjarligur stuðul til húskir við lágum inntøkum, og fer at betra um fíggjarligu korum hjá hesum.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**

Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

*Talva 2: Yvirlit yvir avleiðingar*

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**
*Stk.1*
Endamálið við familjuískoytinum er at bøta um fíggjarligu støðuna hjá barnafamiljum við lágum inntøkum, ið hava fastan bústað í Føroyum.

*Stk.2 og 3*
Hetta verður gjørt við at húski, ið hava eitt inntøkugrundarlag á 120.000 kr. ella lægri, hava rætt til fult familjuískoytið áljóðandi 20.000 kr. um árið, meðan húski, ið hava eitt inntøkugrundarlag, ið er 120.000 kr. ella hægri fáa sítt inntøkugrundarlag mótroknað við 17,5 prosentum. Hetta merkir, at um inntøkugrundarlagið t.d. er 121.000 kr. lækkar familjískoytið við 175 kr. um árið, ið svarar til 17,5 prosent av 1.000 kr.

*Stk.4 og 5*
Haraftrat verður veittur ein frádráttur í inntøkugrundarlagnum, ið svarar til barnagjaldið fyri hvørt barni, ið er skrásett at búgva og faktiskt uppiheldur sær hjá húskinum, umframt ein frádráttur í inntøkugrundarlangum á tvær ferðir barnagjaldið, um tað í húskinum er fleiri enn ein persónur, ið er 18 ár ella eldri.
Sum dømi kann nevnast, at ein stakur uppihaldari við einum barni, ið hevur eina árliga lønarinntøku á 150.000 kr., hevur eitt inntøkugrundarlag á 137.004 kr., ið er inntøkugrundarlagið frádrigið eitt barnagjald á 12.996 kr. Hevur stakur uppihaldari tvey børn,

er hansara inntøkugrundarlag 124.008 kr, ið er inntøkugrundarlagið frádrigið tvey barnagjøld á 12.996 kr.
Sum eitt annað dømi kann nevnast, at eitt par við tveimum børnum fær ein frádrátt í teirra samanlagda inntøkugrundarlagi á tvær ferðir 12.996 kr, ið er barnagjaldið fyri hvørt barni sær. Haraftrat fær parið ein frádrátt, ið er tvær ferðir barnagjaldið á 12.996 kr, tí at tað í húskinum eru tvey vaksin, ið eru 18 ár ella eldri. Hesin seinni frádrátturin kann tó ongantíð vera meiri enn tvær ferðir ta upphædd, ið barnagjaldið er ásett til.

*Stk.6*
Fyri ikki at nýta ósamsvarandi orku upp á ov smá útgjøld, er eitt minstamark ásett.

**Til § 2**
*Stk.1*
Øll vanlig inntøka verður tikin við tá inntøkugrundarlagi hjá húskinum skal ásetast. Eisini skattafrádráttur sambært løgtingslóg um áseting av skatti. DIS inntøka og lestrarstuðul, ið ikki eru skattskyldugar inntøkur, verða umroknaðar til brutto, soleiðis at hesar verða javnsettar við vanliga skattskylduga inntøku.
Inntøkan hjá øllum í húskinum verður tikin við. Til dømis merkir hetta, at í húskjum við fleiri ættarliðum skal inntøkan hjá øllum ættarliðum takast við og hjá einum stakum uppihaldara, ið býr hjá sínum foreldrum, skal inntøkan hjá foreldrunum takast við. Eisini inntøkan hjá heimabúgvandi børnum undir 18 ár, verður tikin við. Hesin háttur at rokna inntøkuna saman hevur sum endamál, at finna teir samfelagsbólkar, ið mest hava tørv á familjuískoyti og at teirra tørvur verður nøktaður fyrst og fremst.
Fyri lesandi, ið fáa lestrarstuðul sambært løgtingslóg um lestrarstuðul er galdandi, at lestrarstuðulin verður lagdur saman við hægstu møguligu lestrarlánsupphædd til livikostnað. Hetta verður gjørt við tí fyri eyga, at familjuískoyti ikki kemur í staðin fyri eitt lestrarlán, ið er ein lógarfestur rættur, ið lesandi kunnu nýta.
Barnaviðbót/barnagjald, serligt barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar, viðbót til ávísar pensjonistar, røktarviðbót, hjálparviðbót, avlamisviðbót og avlamisveiting verður ikki tikið við sum inntøka.

*Stk.2 og 3*
Inntøkan verður uppgjørd fyri farna skattár, men atlit kann eisini takast til væntaða inntøku framyvir. Er sannlíkt, at inntøkuviðurskiftini framyvir broytast skal Almannaverkið, ið er umsitingarmyndugleiki, kunnast, og familjuískoyti kann tillagast hareftir. T.d. tey, ið flyta frá útbúgving til arbeiðsmarknað, koma í eina nýggja fíggjarliga støðu, og familjuískoyti skal tí ásetast av nýggjum.

*Stk.4-7*
Ásetingar um upprokning av inntøkugrundarlagi.

**Til § 3**
Húski skal skiljast sum øll, ið eru búføst, t.v.s. hava fastan bústað í heiminum sambært Landsfólkayvirlitinum.

**Til § 4**
*Stk.1 og 2*
Áseting um at tann, ið søkir um familjuískoyti skal gera tað á serligum umsóknarblaðið. Tann, ið søkir, skal antin hava fullan ella lutvísan foreldramyndugleika ella góðkenning sum fosturforeldur. Haraftrat er tað treyt, at viðkomandi uppiheldur barninum og at barnið hevur fastan bústað hjá viðkomandi, sambært Landsfólkayvirlitinum.

*Stk.3*
Áseting um at Almannaverkið kann heinta inn upplýsingar í samband við málsviðgerðina av umsóknini.

*Stk.4*
Áseting um at familjuískoyti verður útgoldið um ársfjórðingin.

*Stk.5*
Áseting um umrokning, eftirrokning, afturgjaldskrav og upplýsingarskyldu. Hetta fer fram eftir reglunum í løgtingslóg um almannapensjón, soleiðis at familjuískoyti verður viðgjørt á sama hátt sum pensjónin, tá tað ræður um umrokning, eftirrokning, afturgjaldskrav og upplýsingarskyldu.

**Til § 5**
*Stk.1*
Endamálið við familjuískoytinum er at hjálpa fíggjarliga sperdum barnafamiljum. Fyri at familjuískoyti skal raka málbólkin so væl sum til ber, er áseting um, at húski, ið hava eina samanlagda ogn á 30.000 kr ella meiri, ikki kunnu søkja um familjuískoyti.

*Stk.2*
Ogn merkir í hesum føri ogn, ið er innistandandi peningur í peningastovni, virðisbrøv (partabrøv, lánsbrøv o.t.) og kapitalpensjón, ið er tøk um umsóknarmundið.

*Stk.3*
Ogn, ið er bústaðaruppsparing í peningastovni, t.d. við tí endamálið at útvega nýggjan bústað ella gera neyðugar ábøtur á verandi bústað.

**Til § 6**
*Stk.1 og 2*
Til tess at lætta um málsviðgerðina skullu tey, ið fáa familjuískoyti, vátta at tey framhaldandi lúka treytirnar at fáa familjuískoyti. Lúka tey ikki treytirnar ella lata ikki við seg koma, steðgar veitingin frá næsta ársfjórðingi at rokna.

**Til § 7**

Áseting um at útgjaldið, ið er veitt í samband við umsókn um familjuískoyti, ikki kann verða fyri rættarsókn, fyrr enn umsøkjarin hevur fingið útgjaldið útgoldið. Áseting um avtalur um transport.

**Til § 8**
Áseting um ábyrgdina hjá umsøkjara at geva Almannaverkinum upplýsingar um varandi broytingar í inntøkuviðurskiftunum og øðrum viðurskiftum hjá húskinum, ið skerja rættin til familjuískoyti.

**Til § 9**
Áseting um fyrisitingarmyndugleika og kærumyndugleika.

**Til § 10**
Áseting um gildiskomu.

Almannamálaráðið, tann xx.xx.2015

**Annika Olsen**
landsstýriskvinna

/

Eyðun Mohr Hansen
aðalstjóri